UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 15. juni 2022
J.nr.: 22/10228-2
At tilskila í svari

# AVTALA

## millum Granskingarráðið og Umhvørvis- og vinnumálaráðið um at umsita stuðul til gransking í arbeiðsmarknaðarviðurskiftum

Við broyting í løgtingslóg um frítíð við løn (frítíðarlógin) er gjørt av at avtaka Frítíðargrunnin og at flyta fæ grunsins, ið er 10 milliónir kr., og møguligt rakstraravlop til Granskingarráðið at umsita.

Peningurin skal brúkast til gransking í arbeiðsmarknaðarviðurskiftum sambært reglugerð, sum landsstýrismaðurin ger.

*Um stuðulin:*
Verkætlanir, sum fáa stuðul, skulu gagna arbeiðsmarknaðinum frameftir.

Talan kann vera um kanning ella gransking, ið kann fevna um allan arbeiðsmarknaðin, eins og talan kann vera um gransking í viðurskiftum, sum hava serligan týdning fyri starvsfólk í ávísari vinnu ella á ávísum starvsøki.

Tað er ein treyt, at talan er um gransking í viðurskiftum, sum eru viðkomandi fyri partarnar á arbeiðsmarknaðinum, ella í øðrum arbeiðsmarknaðarviðurskiftum, sum tørvur er á at fáa lýst.

Umsitingin, sum er mett at kosta 550.000 kr., verður rindað av fænum.

**Magnus Rasmussen**
landsstýrismaður

**Annika Sølvará**
stjóri í Granskingarráðnum

GONGIN 7 • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN • TELEFON 30 66 00 • E-MAIL: UVMR@UVMR.FO